# Jólamenninir vitja í Eysturoy

*Leygardagin er at halda seg til, tá ið jólabilurin kemur, og jólamenninir aftur fara at vitja øll børn í Eysturoy*



**Í dag fara jólamenninir hjá Kunningarstovunum í Eysturoy at vitja øll børn í oynni**

JÓLAHÝRUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyrr komu jólamenninir í reyðum klæðum og við síðum og hvítum skeggi oman úr fjøllunum við posa á baki. Í køldu fjøllunum uppi í Grønlandi, Svalbard og aðrastaðni við hava teir hildið til síðan seinastu jól. Og aftur í ár hava teir stákast við at pakkað jólapakkar til øll børn í Føroyum – og eisini í Eysturoy. Sum tíðirnar eru broyttar, og minni kavi legst í Føroyum um veturin, hava jólamenninir seinastu árini gjørt av at seta sletuna. Nú eru teir farnir at koyra í bili, sum øll onnur gera. Hetta er so nógv lættari, og nú kunnu teir eisini fara runt alla oynna, hóast eingin kavi er.

Í dag fara jólamenninir soleiðis at vitja børnini í øllum kommunum í Eysturoy. Teir koma í vøkru reyðu bilum sínum við onkrum jólagóða.

So, tað er at halda seg til, tá ið jólabilurin við jólamonnunum kemur.

Jólamenninir hava heitt á kunningarstovurnar í Eysturoy um at siga frá, nær teir eru í teimum ymsu bygdunum.

Jólabilur 1: Strendur kl. 11, Skála kl. 11.15 og Oyrarbakki kl. 11.45, Eiði kl. 12.15, Gjógv kl. 13.00, Funningur kl. 13.15 og Runavík kl. 14.30.

Jólabilur 2: Funningsfjørður kl. 12.00, Oyndarfjørður kl. 12.45, Hellurnar kl. 13.15, Gøta kl. 14.00, Leirvík kl. 14.30 og Fuglafjørður kl. 15.45.



## Skrivstovubygningar til sølu



Ognirnar Yviri við Strond 17 og 19 verða hervið lýstar til sølu. Talan er um tvey matrikkulnummur, sum verða seld saman ella einsæris.
Bygningarnir liggja sera væl fyri; stutt úr miðbýnum, við góðum útsýni og miðskeiðis millum fleiri av fremstu fyritøkum í landinum.

Ognirnar eru Yviri við Strond 17, matr. Nr. 620x, sum liggur næst miðbýnum og Yviri við Strond 19, matr. Nr. 620z. Tilsamans er grundøkið 1691 fermetrar.

Skrivstovubygningarnir eru samanbundnir við eini millumgongd uppá 21 fermetrar á fyrstu hædd. Báðir bygningarnir eru í trimum hæddum og harumframt hevur bygningurin Yviri við Strond 17 eitt loftsrúm uppá 120 fermetrar. Bygningarnir verða seldir við umhvørvisgóðkenning.

Økið rundan um bygningarnar er fríðkað við runnum og blómuteigum og annars gjørt til parkeringsøki og inngongd. Harumframt eru góð parkeringsviðurskifti í økinum.

Sum er, fyriliggur ein skitsu-verkætlan fyri økið um m.a. gerð av íbúðum við altanum og havútsýni.

Meira kunning fæst við at venda sær til:

Pf. Meinhardt Arge
Att.: Finnbogi Arge
við Oyggjarvegin
100 Tórshavn
tlf. 355 400

| | Yviri við Strond 17 | Yviri við Strond 19 |
|---|---|---|
| Matrikkulnummar | 620x | 620z |
| Stødd á grundøki | $858m^2$ | $733m^2$ |
| Grundvídd á bygningi | $288m^2$ | $150m^2$ |
| Byggiár | 1972 | 1986 |
| Gólvvídd | $864m^2$ | $447m^2$ |
| Loftsrúm | $120m^2$ | - |
| Gólvvídd tils. | $964m^2$ | $447m^2$ |
| Skrivstovur/fundarhøli | 18 | 14 |
| Móttøkuhøli | 1 | 1 |
| Kopirúm og edv-rúm | 3 | 2 |
| Goymslurúm | 1 | 4 |
| Toilet | 6 | 6 |
| Køkur og matstova | 1 | - |

P/F Meinhardt Arge
við Oyggjarvegin www.bilarge.fo

